gult24 cyan24 magenta24 svart24



## ÚT AT KOYRA

## Fabia sedan



Skoda Fabia, ið herfyri kom sum stationvognur, kemur nú eisini sum sedan. Viðførisrúmið á bilinum, sum kemur á marknaðin eftir summarfrítíðina, verður 438 litrar.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Bentley til drotningina



Tá bretska drotningin, Elisabeth, næsta ár hátíðarheldur sín 50 ára starvsdag sum drotning, fær hon ein Bentley Arnage Red Label sum gávu. Sjálvur bilurin kostar 1,7 mill. krónur, men liðugt útbygdur við allari hugsandi trygdarútgerð, kostar hann 17 milliónir krónur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ford eigur Hertz



Ford, sum higartil hevur átt 81,5 prosent av útleigingarfyritøkuni Hertz, ið er heimsins størsta, hevur nú keypt allan partapeningin.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Mitsubishi Carisma DI-D koyrir 18,2 km/l




**Tá vit í Sosialinum »Út at koyra« tann 5. apríl skrivaðu um Mitsubishi Carisma DI-D, við nýggjasta orkusparandi motorinum, kom tað av onkrari orsøk at standa, at bilurin koyrir 8,2 km/l. Rættað talið er sjálvsagt 18,2 km/l, tá talan er um ein sera orkusparandi dieselmotor. Við biðja orsaka prentvilluna.**

MITSUBISHI MOTORS

### Mitsubishi Carisma 1.9 DI-D

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1,9 litur turbodiesel 102 hk common rail / intercooler |
| 0-100 km/t | 11,9 sek |
| Oljunýtsla | 18,2 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 447,5 cm |
| Breidd | 171,0 cm |
| Hædd | 140,5 cm |
| Eginvekt | 1275 kg |
| Totalvekt | 1800 kg |
| Prísur | kr. 207.500,- |

# Ford Focus FCV – við brint í fokus

*Ford Focus FCV uttanfyri nýggju orkugranskingarmiðstøðina hjá Ford í Aachen í Týsklandi. Tað hevur kostað 35 mill. krónur hjá Ford at gera hendan bilin*






*Fyri nøkrum árum síðan mátti ein heilur vørubilur til fyri at rúma allari útgerðini, sum í dag tekur lítið pláss í viðførisrúminum*

**Longu í 1874 spáddi franski science fiction rithøvundurin, Jules Verne (1828-1905), at vatn fór at blíva framtíðinnar kol, um tað varð kloyvt sundur í brint og ilt við hjálp av elektrisiteti**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ford, sum samstarvar við BMW og DaimlerChrysler um framleiðslu av brintbilum, hevur gjørt brintbilin, Focus FCV (Full Cell Vehicle), sum hevur kostað 35 milliónir krónur at gera. Brint kann brúkast beinleiðis til forbrenningsmotorin ella sum á Focus FCV við eini brennikyknu, har brint saman við súrevni í luftini ger el-megi til framdriftina á bilinum. Tað, sum kemur úr útstoytinum, er reinur vatndampur. Fyri nøkrum árum síðan mátti ein heilur vørubilur til fyri at rúma allari útgerðini, sum í dag tekur lítið pláss í viðførisrúminum.

### El-motor

Á Focus FCV er bensinmotorurin skiftur út við ein el-motor. Toppferðin er 128 km/t, 0-100 km/t uppá 14,0 sek, og hann koyrir 250 km fyri hvørja áfylling. Ford væntar, at bilurin verður klárur til framleiðslu í 2004, men ikki fyrr enn í 2010 verður hann gjørdur í størri nøgdum. Treytin er. at áfyllingspumpur verða har sum bilarnir skulu seljast. Hetta ljóðar sera áhugavert og verður eitt spennandi alternativ til oljuna.

*Kelda: FDM / Motor*

gult25 cyan25 magenta25 svart25



## ÚT AT KOYRA




*Lupo 3L er ein dýr bilkonstruktión. Hann er gjørdur úr aluminium, magnesium og stáli*
*Mynd: Jens K. Vang*

# VW Lupo 3L – lættur og bíligur í rakstri

**Hóast VW Lupo 3L líkist einum vanligum Lupo í útsjónd, er hann ein heilt annar bilur, sum einans verður gjørdur í einari útgávu. Bilurin eitur 3L, tí hann kann koyra 100 km uppá 3 litrar av brennievni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Bilurin eitur 3L, tí hann kann koyra 100 km uppá 3 litrar av brennievni*
*Mynd: Jens K. Vang*

Lupo 3L er ein dýr bilkonstruktión. Hann er gjørdur úr aluminium, magnesium og stáli. Rætti prísurin í Danmark átti at verið kr. 195.000,-, men donsku myndugleikarnir broyttu skrásetingargjaldið, so bilurin kom niður á kr. 155.000,- fyri at fáa fólk at keypa hendan orkusparandi og umhvørvisvinarliga bilin. Vónandi verður tað sama gjørt her hjá okkum.



*Bilurin trekkjur væl, er kvikur og larmar lítið*
*Mynd: Jens K. Vang*

### 3 syl. TDI

Motorurin er ein 1,2 litur 3 syl. turbodiesel við 61 hk, við nýggjastu TDI innspræningarskipanini. Bilurin trekkjur væl, er kvikur og larmar lítið. Motorurin er gjørdur úr aluminium og vigar einans 100 kg. Um man sleppur speedaranum meðan bilurin koyrir, rullar hann sera lætt og langt uttan at brúka orku. Tá bilurin er heitur, Triptronic gearkassin stendur á automatic, og knøtturin (ECO) er inni, steðgar motorurin 4 sek. eftir at traðkað verður á bremsuna, og startar aftur, tá man sleppur bremsuni. Onki við at dálka luftina meðan man til dømis bíðar eftir reyðum ljósi.

### Lættari dekk

Eisini er nógv gjørt fyri at fáa luftmótstøðuna so lítla sum møguligt, og botnurin á bilinum er næstan heilt sléttur. Umframt at bilurin er lættur og hevur lítla luftmótstøðu, eru dekkini eisini annarleiðis. Stáltræðrirnir í dekkunum eru skiftir út við aramid-fibur, sum er gjørt úr kolevni og køvievni, eins og Kevlar. Hetta gevur sera lága rullimótstøðu. Alufelgur eru standard, og í staðin fyri eykahjólið er ein kompressari til at fylla luft í dekkini við.

### Setur nýggjan standard

Samanumtikið er Lupo 3L ein spennandi og annarleiðis bilur, sum kemur at seta ein standard fyri aðrar orkusparandi og umhvørvisvinarligar bilar. Vónandi fara føroysku myndugleikarnir at taka eins væl ímóti Lupo 3L sum donsku myndugleikarnir, við at lóggeva soleiðis, at orkusparandi og umhvørvisvinarligir bilar sleppa léttari í avgjøldum.

### VW Lupo 3L TDI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,2 litur 3 syl. 61 hk TDI Turbodiesel v/intercoolara |
| 0-100 km/t | 14,5 sek |
| Oljunýtsla | 33,3 km/l |
| Dekkstødd | 155/65-14 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 352,9 cm |
| Breidd | 162,1 cm |
| Hædd | 145,5 cm |
| Eginvekt | 800 kg |
| Totalvekt | 1200 kg |
| Viðførisrúm | 130 litrar |
| Prísur | kr.176.000,- (metallakk kr. 3500,- eyka) |
| Søluumboð | Bilasølan v/Øssur Johannesen Vegurin Langi FO-188 Hoyvík Tlf. 315354 |